## Krígssavnið bjóðar til kapping um búmerki

Arbeitt verður í løtuni við at innrætta fyribils hølir til Krígssavnið í bygninginum, har Felagið Vágar húsast í Miðvági, men ætlanin er seinni at flyta inn í grøna húsið við síðuna av gamla flogtorninum oman fyri flogvøllin. Savnið hevur longu fingið fleiri lutir og vil nú eisini heita á øll, sum eiga ella vita um lutir frá hesi tíðini, um at lata savninum hesar, annaðhvørt til ognar ella til láns. Alt hevur áhuga: Myndir, skamtanarkort, atgongumerkir, pass, heiðursmerkir, búnar, fótbúnar, leikur, alskyns lutir, bæði stórir og smáir, akfør o.m.a. Sjónbandaupptøkur verða í hesum døgum tiknar við fólkum, sum minnast hesa tíðina. Krígssavnið letur upp fyri almenninginum 1. mars 2009 í hølunum á Leitisvegi 58 í Miðvági. Í hesum sambandi verður bjóðað til almenna kapping um búmerki til Krígssavnið. Atlantic Airways hevur stuðlað við tveimum virðislønum, sum eru ferðaseðil aftur og fram á rutunetinum hjá Atlantic Airways.



# Nýggjur skúli í Runavík

**Nútímans skúli er tikin í nýtslu í Runavík. Talan er um ein skúla, við øllum hentleikum. Lærararnir hava munandi betri umstøður, stovur eru til praktisku lærugreinirnar, samstundis sum stórt bókasavn er gjørt. Fyri at seta strikuna uppi yvir ú'num er eisini matarhøll gjørd á skúlanum**

SKÚLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Leygardagin varð nýggi skúlin við Løkin vígdur. Talan er um ein nýmótans skúla við øllum hentleikum. Sjálvt ein matarhøll er bygd, har pláss er fyri umleið 130 fólkum. Sum vera man, eru fólkini kring skúlan fegin.

- Onkur sigur at vakrir tankar trívast í vøkrum umhvørvi, og tað skuldi tað í hvussu so er verið hjá okkum. Vit hava fingið ein skúla, vit eru ótrúliga glað fyri, og umstøðurnar hjá øllum eru vorðnar nógv betri, sigur Durita Joensen, virkandi skúlastjóri í Runavík.




*Starvsfólkini á nýggja skúlanum við Løkin, eru sera fegin um góðu umstøðurnar*

*Mynd: Johnny Lamhauge*

### Ein sentralisering

Seinastu nógvu árini hevur skúlaverkið í Runavík verið spjatt yvir nógvar skúlar. Við hesum skúlanum verður ein sentralisering gjørd, soleiðis, at bæði skúlin í Søldarfirði og tann í Rituvík eru niðurlagdir.

- Vit eru fegin um, at vit ikki longur skulu flyta ímillum so nógvar skúlar. Tað fer at gera arbeiðið hjá okkum lættari, og samstarvið millum lærarar og flokkar verður heilt víst betri, nú vit hava fleiri undir somu lon, greiðir Durita Joensen frá.

Í nýggja skúlanum við Løkin ganga umleið 320 næmingar í fjórða til og við tíggjunda flokki. Skúlin er ein tvísporaður skúli.

Fyrsti, annar og triði flokkur halda framhaldandi til á Glyvrum.

### Nógv hølir

Í mun til eldru skúlarnar eru nógv nýggj hølir, ið ikki hava verið fyrr. Matstovan er bara toppurin, tí eisini eru hølir gjørd til náttúru og tøkni, alis- og evnafrøði, lívfrøði, námsfrøðiligur depil, rúm til skúlasjúkrasystir, húsavørð og NSR-tænastuna. Eisini hava lærararnir fingið nógv betri møguleika at fyrireika seg til undirvísing á skúlanum, tí skrivstovupláss eru gjørd í lærararúminum og í námsfrøðiliga deplinum.

Umframt alt hetta, hevur skúlin eisini fingið nógvar farteldur og internetsamband í øllum skúlanum, samstundis sum skúlin hevur fingið elektroniskar talvur, ið fólk aðrastaðni hava góðar royndir av.

### Fríðka uttanfyri

Hóast økið kring skúlan enn ikki er liðugt, so væntar Durita Joensen, at hetta verður eitt gott øki til fólkini á skúlanum.

- Peningur er settur av, og teir fara í gongd so skjótt sum veðrið batnar. Tað er eitt økið vit kunnu fáa stóra nyttu av, tá tað verður endaliga liðugt, greiðir Durita Joensen frá.

### Mentanarhús

Í nýggja skúlanum við Løkin verður eisini ein stór aula tikin í nýtslu, áðrenn alt ov long tíð er gingin. Ætlanin er at nýta hesa til mentanarhús hjá Runavíkini.

Runavíkar kommuna hevur eisini sett pening av til at keypa list til skúlan. Hetta gleðir virkandi skúlastjórin seg eisini til.

# Økja um almennu íløgurnar

**Álitið hjá fíggjarnevndini leggur upp til, at flestu rakstrarstøðini skulu spara, og at fleiri pengar skulu brúkast til íløgur kring landið**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenkov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Seinnapartin í dag fer fíggjarnevndin at leggja álit fram um fíggjarlógina fyri 2008. Nevndin hevði síðsta fundin klokkan 10 fyrrapartin, og fyri døgurða fóru limirnir at skriva álit, ið verður lagt fram á tingfundinum, sum formaðurin hevur lýst at vera klokkan 16.30.

Sum tað skilst, so skriva samgongulimirnir sítt álit, meðan andstøðuflokkarnir skriva sítt. Hóast talan er um fleiri álit, so siga keldur innarlaga í politiska umhvørvinum, at tað hevur eydnast at finna breiða semju um tølini.

Lítið hevur verið at hoyrt um arbeiðið í fíggjarnevndini. Greitt er kortini at broytingar verða gjørdar sammett við uppskotið, sum upprunaliga varð lagt fram.Tá var talan um framskrivað tøl uttan politiska viðgerð. Spenta politiska støðan var orsøk til ta støðuna.

Væl vitandi keldur í politiska umhvørvinum vilja vera við, at raksturin er minkaður umleið hundrað milliónir sammett við uppskotið, sum varð lagt fram fyrr í heyst. Flestu rakstrarkonti eru minkaðar sammett við uppskotið, ið varð lagt fram síðst í september.

Í staðin eru íløgukontirnar øktar við upp móti eins stórari upphædd. Sagt verður at fíggjarnevndin mælir til íløgur kring alt landið. Hetta verður mett at vera skilagott, nú stígur er komin í búskapin, og arbeiðsloysi hóttir.

Sambært heimasíðuni hjá Løgtinginum, so verður síðstu tingfundur í hesum árinum fríggjadagin 19. desember klokkan 9.30.

Tingið skal taka støðu til nógv mál, áðrenn tað fer í jólafrí. Umframt tingfundin seinnapartin í dag eru fundir ásettir at vera í morgin, hósdagin og fríggjadagin kl. 9.30.

Einki er at ivast í, at talan verður um langar fundir. Umframt 2. og 3. viðgerð av fíggjarlógaruppskotinum eru fleiri onnur mál, sum skulu hava 1. og 2. viðgerð. Fríggjadagin verða 3.viðgerðir. Tá kann roknast við, at orðaskiftið verður millum lítið og einki, og at atkvøðugreiðslurnar verða nógvar.